Mugu í størri álvara troyta varandi orkukeldur

-Tað er í tøkum tíma, at vit fáa ein skipaðan orkupolitikk í Føroyum, sum í nógv størri mun fær okkum at hyggja eftir varandi og alternativum orkukeldum sigur Poul Michelsen, tingmaður, ið eisini setir eitt stórt spurnartekin við, um tað er rætt, at SEV einsasmælt skal hava ábyrgdina av øllum orkumálinum

ORKA
Jan Müller,
jan@sosialurin.fo

Fyri góðum mánað síðani var stór og áhugaverd orkuráðstevna hildin í Reykjavík, har eitt nú varandi og alternativar orkukeldur vórðu viðgjørdar. Fleiri umboð vóru við úr Føroyum, sum eitt nú SEV. Vinnumálaráðið og politikarar, teirra millum eisini Poul Michelsen, tingmaður og limur í Útnorðurráðnum, sum heldur, at orkuráðstevnan varð ótrúliga góð og gav okkum nógv at hugsa um og arbeiða víðari við. Í hesum sambandi heldur Poul Michelsen eisini, at tað er uppá tíðina, at vit í Føroyum fáa ein orðaðan orkupolitikk.

-Í Íslandi arbeiða tey við alternativum orkumøguleikum, eitt nú bæði brintbilum og brintskipum. Vit í Føroyum mugu í nógv størri mun til at gera meira við varandi orku, og tí er tað eisini í tøkum tíma, at vit eru farin at orða ein veruligan orkupolitikk sigur tingmaðurin, sum tó viðgongur, at orkupolitikkurin, sum man nú er við at skipa, kemur alt ov seint. Men okkurt er so við at henda, og í hesum sambandi heilsar Poul Michelsen m.a. vindmylnuprojektinum í Vestmanna vælkomnum.

Poul Michelsen, tingmaður: -Hækkandi oljuprísirnir gera føroysku undirgrundini uppaftur meira áhugaverda

Stórar broytingar fyri framman

Poul Michelsen vísir á, at stórar broytingar á orkuøkinum standa fyri framman, broytingar, sum eisini vit føroyingar, hóast fámentir, mugu til at vísa størri ans. Hann vísir á, at vit í løtuni hava bæði eina ringa og torføra støðu og eina góða hyggja vit at okkara orkuframtíð. Tann torføra er at gera meira við alternativu orkuna, sum gerast alt meira átrokandi, nú tað so týðuliga kom fram á orkuráðstevnuni í Reykjavík, at oljan er avmarkað til at vara í eini 40 til 50 ár ella so. Hetta merkir í veruleikanum, at tað hevur stóran skund at gera nakað við varandi orkuna. Tann góða støðan hjá okkum er so tann, at hækkandi oljuprísir kunnu skapa størri áhuga fyri at leita eftir olju her hjá okkum.

–Lítið bendir á, at oljuprísurin fer at lækka, heldur er tað beint tvørturímóti, uttan so at nógv meira verður gjørt fyri at finna nýggjar orkukeldur ella at meira fast burtur úr verandi kolvetnisgoymslum í undirgrundini. Tað merkir, at taka vit bara helvtina av tí tíðarskeiðinum til at vit hava termiska orku tøka, so fer oljuprísurin innan fyri ábyrgdina. Tí tað stendur greitt, at tú innan relativt stutta tíð skal finna alternativa orku, sum varandi kann avloysa oljuna. Jú longur nøkur fá ár at tvífaldast ella hækka enn meira, um ikki tað kemur alternativ orka inn ístaðin fyri.

SEV og samfelagið

Poul Michelsen nemur í hesum sambandi eisini við okkara egna leiklut í orkuhøpi. Hann setir stórt spurnartekin við, um tað er rætt, at SEV meira og minni einsamalt hevur ábyrgdina av øllum orkumálinum. –Var eg SEV hevði eg ikki viljað átt ta tíðin gongur, styttist til markið, har vit hava nakra olju eftir. Tað vil hava við sær, at vit ikki kunnu rokna við, at orka verður framleidd til teir prísir, tað verður gjørt í dag. Vit eru tí noydd í nógv størri mun enn í dag at fara út at leita eftir alternativum orkukeldum, tað verið seg vind-, aldu- ella streymorku.

At SEV hevur sín egna orkupolitikk heldur Poul Michelsen vera í lagi, men hann spyr samtíðis, um tað er rætt, at SEV er einsamælt á hesum øki. -Er tað rætt í einum samfelag við eini so stórari uppgávu á orkuøkinum, at SEV átekur sær at vera ábyrgdandi fyri allari orku í framtíðini? Eg hevði ikki viljað átt ábyrgdina av øllum framtíðar orkupolitikkinum í Føroyum, um eg var SEV. Tí meini eg, at tað mugu koma fleiri aktørar á marknaðin, soleiðis at tað vera fleiri alternativ, og at vitanin verður meirfaldað.

Størri áhugi við hækkandi prísum

Poul Michelsen vísir á, at tað góða við støðuni í dag við hækkandi oljuprísum nógva orku til at finna oljuna her og útvinna hana. Og hetta ikki minst tí, at oljufeløgini eru rættiliga vís í, at hon er her.

Hækkandi oljuprísirnir fara tí at gera, at áhugin fyri at leita eftir olju við Føroyar, fer at vaska. Eisini um tað verður neyðugt at fara eftir keldum, sum eru dýrari at útvinna. Poul Michelsen sær tí fyri sær eina gongd, har oljufeløgini fara at gera alt fyri at finna og útvinna kolvetni í føroysku undirgrundini samtíðis sum nógv meira fer at verða gjørt fyri at finna alternativar orkukeldur.

2. útbjóðing til at leita eftir kolvetnum á landgrunninum letur upp 17. august. Poul Michelsen er sjálvur vísur í, áhugin verður stórur fyri 2. útbjóðing. Hann heldur eisini, at tað er rætt at broyta treytirnar, soleiðis, at um tað eydnast oljufeløgunum at finna nakað, so fara tey eisini at fáa nakað burtur úr. 1. útbjóðing heldur hann gekk meira uppá, at oljufeløgini skuldu uppá forkant leggja rættiliga nógva trygd. Henda broytingin kann hava við sær, at tað vera fleiri, sum vera við. Tey er, at áhugin fyri at leita eftir olju í tí føroyska økinum verður tilsvarandi størri, og tí er rættiliga sannlíkt, at oljuídnaðurin fer at brúka flestu eru greið yvir, at oljan finst her, tað er bara spurningur um tíð.

Jethro Tull hittu fjepparar í Klaksvík

Onkur av teimum hevði bíðað í eini 30 ár, so tað bilti lítið, at Jethro Tull vóru ein hálvan tíma seinkaðir, tá teir týsdagin komu at hitta trúfasta fjepparabólkin í Klaksvík

Anna V. Ellingsgaard,
anna@sosialurin.fo

Spenningurin lat seg ikki fjala hjá teimum 8 - 10 ikki heilt ungu monnunum, sum vóru savnaðir uttanfyri býráðshúsið í Klaksvík týsdagin seinnapartin. Og hóast Jethro Tull vóru nakað seinkaðir, so ávirkaði tað ikki góða hýrin hjá fjepparnum, sum høvdu sett alt annað til viks hesa løtuna fyri at hitta sínar stóru tónleikahetjur. Tí sum onkur av teimum segði: Tað taka vit við - summir av okkum hava bíðað í eini 30 ár.

Fjepparnir nýttu sjálvandi høvið at syngja "Happy Birthday" fyri Ian Anderson, sum fylti 57 ár hendan dagin, teir hittust

Vitjanin hjá Jethro Tull týsdagin man havi verið ein av teimum meir óvanligu hendingunum, býráðshøllin í Klaksvík hevur verið karmur um

Føðingardagssangur og trøllasøgur

Býráðshøllin í Klaksvík hevur uttan iva verið karmur um eitt sindur av hvørjum gjøgnum árini, men føðingardagssangurin fyri oddamanninum í Jethro Tull, Ian Anderson, mundi hoyra til eitt av teimum meir øðrvísi innsløgunum. Anderson fylti nevniliga 57 hendan dagin, og tað lótu fjepparnir ikki fara stillisliga framvið. Neyvan vóru tónleikarnir sessaðir, tá ein fúsur Alex Sólstein setti seg við klaverið, og teir ikki minni væl upplagdu fjepparnir stemmaðu í "Happy Birthday", sum teir sungu á tamb av heilum hjarta fyri tí ikki sørt ovfarna Ian Anderson.

Alex hevði eisini fingið heiðurin at halda røðu fyri Jethro Tull limunum, sum hugtikinir lýddu á, meðan Alex rættiliga fekk lív og dramatikk í hendingar og trøllasøgur úr Norðoyggjum

Fjepparar og kennarar

Tað var Jórun Høgnesen, formaður í mentanarnevndini, sum saman við Oddvu Nattestad samskipara á Listastevnuni, hevði fingið hugskotið til, at fjepparabólkurin í Klaksvík skuldi sleppa at hitta Jethro Tull. Tiltakið var óalment, og heldur ikki fjepparnir vistu av nøkrum, fyrr enn beint áðrenn Jethro Tull løgdu at í Klaksvík.

Jórun hevði fingið hugskotið, tá hon í vár hoyrdi eina sending í útvarpinum, har eldhugaðu fjepparnir greiddu frá, hví teir vóru so hugtiknir av Jethro Tull. Øll, sum hoyrdu sendingina, mundu varnast, at hetta vóru veruligir kennarar av søguni hjá Jethro Tull og teirra tónleiki. So tað mundi vera ein sermerkt uppliving hjá teimum at fáa eitt prát við tónleikahetjurnar og uttan iva eisini hjá Jethro Tull at hitta hendan fjarðskotna og óvanliga trúfasta fjepparabólkin í Klaksvík.

Ian Anderson:

Tíðliga í song og reisir snimma

Fremsti maðurin í Jethro Tull helt týsdagin sín 57 ára føðingardag í Føroyum. Hann er ikki eitt veitslumenniskja og føðingardagar eru ikki nakað hann ger nakað burturúr, uttan so, at onkur annar fyllir ár. Anderson minnist ikki, nær Jethro Tull seinast spældi fyri færri enn 1000 fólkum, kanska var tað í 1968. Best dámar honum at liggja í songini, tá klokkan gerst 23, men so er hann eisini á fótum um 6 ella 7 tíðina. Her hugleiðir hann um tónleik, tónleikalív, fiskaaling og matídnað og lívið sum heild, tá ein er í búnum aldri

TÓNLEIKAVITJAN
Dagfinn Olsen
dagfinn@sosialurin.fo
Myndir: Maria Olsen

Tað er av sonnum eitt heimsnavn, ið vitjar listastevnuna og longu í vár var útselt til konsertina við Jethro Tull.

Sosialurin hitti Ian Anderson mikumorgunin, innan hann og hinir í bólkinum fóru at gera klárt til konsertina á kvøldi.

Jethro Tull hevur selt eini 60 milliónir eintøk av útgivnu útgávunum, 2500 konsertir í 40 londum í 30 ár er tað blivið til, síðani byrjan í 1968. Vanliga lurta eini 30.000 fólk, men til konsertina í Norðurlandahúsinum er rúm fyri 900 fólkum, og Ian Andersson minnist ikki, nær teir seinast hava spælt fyri so fáum fólkum og á so lítlum palli í so lítlum húsi, men kanska var tað í 1968, skemtar Ian Anderson, sum sammetir við, at bólkurin fríggjadagin spælir til útikonsert í Onglandi, har eini 15.000 fólk verða savnaði.

Men ein av orsøkunum til at superbólkurin vitjar Føroyar er júst ein øðrvísi uppliving og náttúran.

Vænti ongantíð nakað

Vit hitta Anderson í forhøllini á Hotel Føroyum fyri at tosa um føðingardag í Føroyum, um konsertina á kvøldi og um hvat hann væntar, og um lívið sum tónleikari og sum alari.

- Tú rakti tvey evni, ið eg havi ilt við at tala um, føðingardagar og hvat mær dámar landið. Eg vænti ongantíð nakað, tá eg vitji lond og tað nervar meg ikki sørt, tá fólk spyrja hvat eg haldi um teirra vakra land. Fólk kenna sítt land og tey vita hvat tey hava, men eg kenni nógv aftur her, seyð, fjøll og annað, tí eg vitji nógv í Skotlandi, men eisini nógv av hesum er felags við onnur øki við hav, so sum Skotland, Hetland og mentanin tykist lík, sigur Ian Anderson, sum týskvøldið neyt ein betri bita á Vertshúsinum í Havn, eftir ferð í føroysku náttúruni.

- Men eg legði til merkis drekkivanarnar. Fólk kunnu drekka nógv og tað sigur mær, at tey hava pening, tí bíligt er tað ikki, staðfestir Ian Anderson.

- Men fólk eru fitt og fyrikomandi, men allastaðni eru spilt súrepli ímillum, men eg havi so ikki møtt nøkrum av hesum enn, sigur Anderson, sum ongantíð hevur væntað nakað, tá hann skal spæla ella tá hann vitjar, tí heldur vil hann gerast bilsin og hava eina avbjóðing.

- Tá eg fari á pall, so taki eg tað sum eina avbjóðing, uttan at vænta nakað. Kanska sum ein formel 1 kapping, har eg kanska byrji sum meistarin, men so kann alt henda. Eg spæli kanska eini 3 skeivar tónar í kvøld, men neyvan nakar leggur tað til merkis. Eg má arbeiða hart fyri at halda á í eini 10 - 15 ár afturat og so komi eg kanska niður á 2 skeivar tónar fyri hvørja framførslu, smáflennnir Ian Anderson, meðan hugurin reikar, meðan mjørkin liggur tætt at stóru vindeygunum í gongini á hotellinum.

Føðingardagar

Ian Anderson helt týsdagin sín 57 ára føðingardag í Føroyum og skipað var fyri útferð og hugna á Vertshúsinum á kvøldi, men hetta var ikki júst orsakað av føðingardegnum.

- Sum so haldi eg ikki føðingardagar. Eg taki góðynskini til mín, men annars njóti eg, tá onnur fylla ár og tá hjálpi eg fegin til. Eg eri ikki veitslumenniskja, men sjálvandi er altíð stuttligt við smáum hendingum, sum gera ein bilsnan, sigur Anderson.

- Mær dámar best at liggja í songini, tá klokkan gerst 23, og eg eri eisini á fótum um 6 ella 7 tíðina og júst hetta er eingin trupulleiki her, tí teir arbeiða upp á takið her á hotellinum, so teir ganga uttanfyri vindeygað, so gardinurnar helst mugu vera fyri, tí tað er neyvan nakar, sum ynskir at síggja okkara trummuleikara naknan, skemtar Anderson.

- Mær dámar at vera í náttúruni. Men í morgun tá vaknaði helt eg, at føroysku myndugleikarnir høvdu gloymt at gjalda, so at realityshowið ikki fór frá, tá eg hálaði gardinurnar frá. Tað var , sum pappír var fyri vindeygað, so tjúkkur lá mjørkin og eina løtu helt eg, at eg var í einum flogfari. Á Ísle of Sky, har eg ávirkaði hetta nøkur av fólkunum, sum gjørdust tunglynt, meðan nøkur ikki ávirkast, og so má eisini vera her, metir Ian Anderson.

Fiskaaling

Ian Anderson hevur í eini 25 ár fingist við fiskaaling.

Eg byrjaði í 1978 og helt á í eini 25 ár, men gavst so fyri trimum árum síðani, tó okkurt smávegis er eftir enn, sigur Andersson, sum hevði eini 400 fólk í arbeiði og sum hugsaði nógv um ábyrgdina av hesum.

Um kreppuna í heimsins alivinnu hevur Ian Anderson viðar hugleiðingar.

- Vit mugu sjálvi taka ábyrgdina av kreppuni í alivinnuni í heiminum, tí t.d. yvirframleiðsla er ein trupulleiki og er tað í so mongum greinum innan matídnaðin, metir Anderson, sum sveimar víða og sum ásannar, at úr øðrum londum - sum finnast at - kemur nógvur lortur rekandi til okkara leiðir og eisini er tað so, at tóku vit hóp av royndum, so ótu vit onki av tí, ið vit eta í dag, men sum einstakir framleiðarar hava vit ikki ráð til hesar royndir, hugleiðir Andrson.

Eg fann t.d. útav, at grísablóð var í fóðrinum til alifiskin og hetta er fyri 15 árum síðani, so vit hava vitað av samanhangi og trupulleikum longi, sigur Anderson, sum peikar á trupulleikan við matídnaðinum sum heild, har tað er trupult at finna dygd og ektaða vøru, men hann metir, at vit í Føroyum møguliga hava møguleikar fyri at koma at góðum mati, men annars er tað so, at fólk lata eyguni aftur og fara á McDonalds.

- Stuttligari er at spæla tónleik, tí matvinnan er ikki stuttlig, sigur Ian Anderson.

Tónleikur og aldur

- Tá ein er tónleikari í mínum aldri, so hugsar ein, at kanska eru eini 10 ár eftir. Tá eg fylli 70 ár fari eg kanska at broyta yrkisleið - spæla tennis ella koyra rasarabil, skemtar Anderson.

- Nei, men kanska fari eg aftur at mála, tekna og skriva, sum eg havi fingist eitt sindur við, men tónleikur er mín samleiki. Eg eri einasti floytuspælari á heimsins rockpalli - tann ringasti og tann besti - og ongin ungur krúnprinsur er ávegis eftir krúnuni, hugleiðir Anderson.

Sagt verður um Jethro Tull, at disiplin er ein orsøk til, at teir halda enn.

- Tað er rætt, at manningin hevur sjálvdisiplin, eg meini, teir duga sjálvir at fara upp á morgni og teir skulu ikki sleipast inn í flogfari, men soleiðis er við teimum flestu, ið eg havi samstarvað við og eisini teir, ið fáast við at seta upp ljóðføri, eru í dag sera at sær komnir,og tað er so, at er onkur, sum ikki passar sítt, so er hann ikki við á næstu ferðini, so einfalt er tað, sigur Anderson.

- Tað er langt síðani, at vit hava spælt fyri færri enn 1000 fólkum, kanska var tað í 1968. Nei, men vanliga spæla vit á stórum ítróttar arenaum, og ofta á útkonsertum ella í kendum konserthallum og sammetast kann við, at fríggjadagin spæla vit fyri 15000 fólkum í Onglandi til eina útikonsert, sigur Ian Anderson, sum eisini hevur spælt saman við Uriah Heep, men sum tó bert hevur hoyrt um Ken Hensley, sum eisini vitjar Føroyar komandi dagarnar.

- Tað er so, at mong eru deyð innan tónleikaheimin, sum eg havi lurtað eftir og spælt saman við, sigur Anderson og biður tey, sum eru til rocktónleik og skemt um at finna fram til ein film um tónleikalív, tí hesin er so nær veruleikanum, hóast langt úti, at bólkar brúka hann sum dokumentar tilfar, heldur enn undirhhald. Filmurin (Spind Tab, ella nakað soleiðis, her skrivað leysliga í skundi, blóm.) er sera nær veruleikanum, sigur Ian Anderson,

Hýruvognurin kemur úr mjørkanum og manningin í Tull fer í Norðurlandahúsið at gera klárt til konsertina og eitt stutt, men vitt prát er at enda, og eftir stendur tónleikurin, og hóast Anderson ikki vil vænta nakað, so vænta føroyingar sær góða konsert, tað er prógvað av, at útselt var til konsertina í marsmánaðið.